Gospel 2003:

Gospel Prix á fyrsta sinni

Fyri fyrstu ferð nakrantíð í Føroyum verður skipað fyri einum gospel prixið í Føroyum. Anja Hansen og Eyðun Jacobsen eru stigtakarar. Prixið byrjar í august mánaði, og finalan verður í oktober. Øll innleiðandi umførini og finalan sjálv verða í Mentanarhúsinum í Fuglafirði

Anja Hansen (t.h.) er ein av fyrireikarunum aftanfyri Føroya fyrsta Gospel Prix, sum verður send av bakkastokki í august. Laila Hentze var við á tíðindafundinum sum umboð fyri Televarpið

Mynd: Jens Kr. Vang

GOSPELPRIX
Ingrid Bjarnastein

Føroya fyrsta Gospel Prix fer av bakkastokki í august mánaði í Mentanarhúsinum í Fuglafirði. Talan er um trý innleiðandi umfør við eini finalu.

Tað eru Anja Hansen og Eyðun Jacobsen, sum í samstarvi við Rás 2 og Televarpið, ið skipa fyri.

– Endamálið við Gospel Prixnum er at menna gospeltónleikin í Føroyum, tí okkara meting er, at kristin tónleikur er eitt sindur skumpaður í bakgrundina. Soleiðis sleppa bólkarnir á pall og sleppa at framføra tónleik undir góðum umstøðum, siga fyrireikararnir.

Televarpið við

Kravið til bólkarnar ella einstaklingarnar er, at teir skulu spæla kristnan tónleik. Hvat tónleikaslagið er, er líkamikið.

Bólkar og einstaklingar kunnu luttaka, men tó verður talan ikki um nøkur stór kór, sum fólk vanliga seta í samband við gospel. Tað kunnu í mesta lagi vera nóggju persónar í einum bólki.

– Nakrar reglar hava vit eisini gjørt. Ein teirra er, at sami frontfigurur kann ikki verða í fleiri bólkum, men tilfarið, sum teir spæla nýtist ikki at verða sjálvskrivað. Tað gera bólkarnir sjálvir av, men boðskapurin skal vera kristiligur, greiðir Eyðun Jacobsen frá. Hann leggur stóran dent á, at høvuðsendamálið við Gospel Prixnum er ikki kapping, men heldur at skapa betri karmar fyri gospelbólkum í Føroyum.

Fyrireikararnir meta ikki, at eitt Gospel Prix fer at hava við sær, at gospelbólkar fara at halda uppat við at melda til Prix Føroyar. Gospel Prixið fer heldur at geva teimum møguleika at sleppa út til eina breiðari áskoðarafjøld.

Sum nakað heilt serligt, so er Televarpið eisini knýtt at tiltakinum. Og verður Gospel Prixið tað fyrsta stóra tiltakið, sum Televarpið fer at senda frá. Rás 1, sum rásin hjá Televarpinum eitur, fer at senda frá Gospel Prixnum vikuna aftaná, at innleiðandi umførini hava verið.

– Rás 1 byrjar at royndarsenda aftaná summarfrítiðina. Men tað verður við ymsum øðrum, og tað er ikki vist, at talan verður um livandi myndir beinanvegin. Gospel Prixið verður so tað fyrsta stóra, sum Rás 1 fer at senda frá, sigur Leila Hentze frá Televarpinum.

Útvarpsrásin, Rás 2, fer eisini at senda frá Gospel Prixnum. Tað verður sent beinleiðis út í luftina tey kvøldini, innleiðandi umførini eru, og eisini frá sjálvari finaluni.

– Vit vilja ikki hava nakran b-film. Hetta skal gerast væl og vit skulu hava eitt so gott tiltak, sum møguligt, og tað skal ikki standa aftanfyri onnur stór tiltøk í Føroyum, sigur Anja Hansen.

Vinningarnir

Fyrsta virðisløn verður helst luttøka á einum stórum summarfestivali onkustaðni í Evropa. Hvar, hvussu og nær er ikki fastlagt enn, og arbeitt verður eisini við eini studioupptøku. Vinningar verða eisini til bólkarnar, sum gerast nummar tvey og trý.

Viðvíkjandi figging, so verður væntað, at tiltakið hvílir í sær sjálvum. Men søkt verður eisini um stuðul aðrastaðni frá.

– Alt er ikki endaliga fastlagt enn. Men Gospel Prixið verður, tað er heilt vist. Vit hava fingið ógvuliga positivar viðmerkingar frá teimum, sum vit hava tosað við, so vit eru ógvuliga spent uppá tað, sigur Anja.

Um Gospel Prixið verður eitt afturvendandi tiltak, vita fyrireikararnir ikki enn. Men um undirtøkan er nóg góð, so er væl hugsandi, at Gospel Prixið verður aftur á breddanum.

Tilmeldingarfreistin er tann 1. august, og innleiðandi umførini verða ávíkavist 30. august, 13. september og 27. september. Sjálv finalan verður í Mentanarhúsinum í Fuglafirði tann 11. oktober.

Tvær stevnur á Skálafjørðinum samstundis

Róðrarsamband Føroya hevur lagt nýggju Fjarðastevnuna, sum hesaferð verður á Strondum, sama vikuskiftið, sum Eystanstevnan er í Runavík. Hóast fólk á vesturarminum á Skálafjørðinum hava mótmælt hesum og hava havt uppskot um tvey onnur vikuskifti, hevur Róðrarsambandið ikki verið at tosað við

STEVNUR
Vilmund Jacobsen

Tá ið fólk á Skála og Strondum í fjør heyst frættu, at Róðrarsamband Føroya hevði ætlanir um at skipa eina nýggja FM-stevnu aftrat, lótu tey ikki hendan møguleikan fara aftur við borðinum. Tey fýra felógini á Skála og Strondum, Skála Ítróttarfelag, Róðrarfelagið á Skála, StÍF og Strálan, høvdu ein felags fund í november í fjør og eftir fundin, sendu tey skriv til Róðrarsambandið, har tey bjóðaðu seg fram at skipa fyri hesi stevnu.

Úrslitið, sum spurdist burtur úr hesum, er Fjarðastevnan, sum nú annaðhvørt ár verður á vestara armi á Skálafjørðinum og annaðhvørt ár í Vestmanna.

Óheppið val

Tá ið tað gjørdist greitt, at Róðrarsambandið hevði lagt hesa stevnu júst sama vikuskiftið, sum Eystanstevnan verður hildin í Runavík, hava felógini á vestara armi mótmælt hesum, tí tað er óheppið, at tvær stevnur eru á Skálafjørðinum samstundis.

Tað kemur dátt við - báðumegin Skálafjørðin - at Róðrarsamband Føroya hevur lagt nýggju Fjarðastevnuna sama vikuskiftið, sum Eystanstevnan verður hildin í Runavík

Í Runavík eru tey sjálvsagt eisini hørm um hesa avgerð og hava hug at halda, at tað eru felógini á vestara armi, sum vilja kroysta eina stevnu niður hinumegin fjørðin, samstundis sum regluliga stevnan er í Runavík.

Men soleiðis hongur tað ikki saman.

Á vestara armi havi tey ikki bara mótmælt hesum. Tey hava eisini havt uppskot um tvey onnur vikuskiftir, har tey halda, at stevnan kundi ligið.

Í fyrsta lagi hava strandingar og skálafólk vístá, at Vestanstevnan kundi verið eina viku seinni enn ætlað, soleiðis at Fjarðastevnan kundi verið tað vikuskiftið, ið Vestanstevnan er. Í øðrum lagi hava tey vístá, at Fjarðastevnan kundi ligið tvær vikur fyri ólavsøku.

Men bæði hesi uppskotini eru feiðað av borðinum av Róðrarsambandinum - uttan, at strandingar og skálafólk rættiliga vita hví.

Á Strondum og Skála vildu tey helst, at Vestanstevnan varð flutt eina viku, tí tvær vikur fyri ólavsøku er eisini stevna í Gøtu. Men har er so eingin kappróður at taka hædd fyri.

Nú Fjarðastevnan og Eystanstevnan liggja sama vikuskiftið, ber ikki til at hava kappróður á Eystanstevnu, sum tað annars plagar at vera.

Avgerðin hjá Róðrarsambandinum setir tískil báðar "armarnar" á Skálafjørðinum upp ímóti hvørjum øðrum.

Sum skilst, hava strandingar og skálafólk roynt tað, tey hava kunnað at fáa Róðrarsambandið at skipa so fyri, at stevnurnar báðar ikki verða sama vikuskiftið.

Men tað hevur so verið til fánýtis.

Undarligt kann tað tykjast, at tá ið stevnan verður í Vestmanna komandi ár, er einki til hindurs fyri, at hon ikki liggur sama vikuskiftið, sum Eystanstevnan er í Runavík…

Pedagogar og hjálparfólk

til útibarnagarðin á Tvøroyri og pedagogar til vøggustovuna á Mýrufípuni

Vøggustovan:
Søkt verður eftir 1 pedagogi til vøggustovuna á Mýrufípuni. Arbeiðstíðin er 30 tímar um vikuna. Starvið verður sett frá 01. aug. 03.

Útibarnagarðurin:
Útibarnagarðurin letur upp mánadagin 18. aug. 03 í hølunum, har Nautilus er nú. Í útibarnagarðinum koma 21 heildagsbørn at ganga í aldrinum 5-7 ár.

Søkt verður eftir:
3 pedagogum og 1 hjálparfólki at arbeiða 30 tímar um vikuna. Arbeiðstíðirnar eru skiftandi millum 7.30-18.00.

Vit vænta av tær:
- At tær dámar at arbeiða úti allar árstíðir og í øllum veðri
- at tú hevur hugflog og dugur at nýta náttúruna sum arbeiðsamboð
- at tú hevur góð samstarvsevnir
- at tú vísir virðing fyri børnum, foreldrum og starvsfeløgum
- at tú hevur gott innlit í námsfrøðiligt arbeiði innan dagstovnaøkið
- at tú hevur gott yvirlit í tí dagliga arbeiðinum
- at tú mennist støðugt í tínum arbeiði og er opin fyri nýggjum avbjóðingum

Lønar og setanarviðurskiftir:
Løn sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala arbeiðsgevarafelagið. Størvini verða sett frá 01. aug. 03.
Um pedagogar ikki fáast til øll størvini, verða hjálparfólk sett fyribils í tíðaravmarkaði størv.
Meiri fæst at vita um størvini við at venda sær til Biritu Jacobsen, leiðara á tlf. 372700.

Umsókn:
Umsókn saman við upplýsingum um útbúgving, royndir og møguligum viðmælum skulu vera Dagstovninum Mýrufípuni í hendi í seinasta lagi mánadagin 23.06.2003.

Tvøroyrar Býráð

Eysturoyar Røktar- og Ellisheim

søkir:
Sjúkrahjálpara/heilsuatstøðing 1,00 tíð frá 01. oktober 03 at rokna.

Avloysara fyri sjúkrarøktarfrøðing 0,5 tíð at byrja beinanvegin ella eftir nærru avtalu. Starvstíðin er til 01. november 03.

Umsókn saman við prógvi, viðmæli o.a. skal vera komið okkum í hendi innan 18. juni 03.

Nærri størvunum viðvíkjandi fæst at vita frá fyristøðumanninum á tlf. 448185 ella 448201.

TEKNISKI SKÚLIN
TÓRSHAVN

søkir lærarar

Lærari til el-deildina
Starvið, sum er eitt **fulltíðarstarv**, umfatar undirvísing á el-deildini.

Umsøkjarin skal hava sveinabrævi sum elektrikari, hava prógv sum el-installatørur og minst 2 ára starvsroyndir innan yrkið. Neyðugt er at umsøkjarin hevur kunnleika til nýggjastu el-útgerð. Eisini er áhugi fyri stødd-, alis- og evnafrøði, og nýtslu av EDV, ein fyrimunur.

Á el-deildini starvast 5 lærarar í føstum starvi og 1 verkstaðarhjálpari. Næmingarnir læra til elektrikara og ganga í skúla í 55 vikur tilsamans. Eisini verða SIT-næmingar undirvístir á deildini.

Lærari til timburdeildina
Starvið, sum er eitt **fulltíðarstarv**, umfatar undirvísing á timbur- og snikkaradeildunum.

Umsøkjarin skal hava sveinabrævi sum húsasmiður, og minst 2 ára starvsroyndir innan yrkið. Umsøkjarar við hægri útbúgving hava fyrimun.

Timbur- og snikkaradeildirnar eru í sama bygningi. Lærarnir skifta ímillum báðar deildirnar. Á deildunum starvast 8 lærarar í føstum starvi og 1 verkstaðarhjálpari. Næmingarnir læra til húsasmið ella bygningssnikkara og ganga í skúla ávikavist 45 og 50 vikur tilsamans. Á deildini verða eisini SIT næmingar undirvístir.

Setanarkor til fast starv:
Fyrstu 2 árini verða roknað sum royndartíð, har tann, sum verður settur í fast starv, má vera til reiðar at taka ta eftirútbúgving, tað verður seg pedagogiska/undirvísingarliga ella aðra førleikagevandi útbúgving, sum er neyðug fyri at verða settur í fast starv.

Løn:
Lønin verður sambært sáttmála millum Føroya Landsstýri og FTL.

Størvini skulu setast 11. august 2003.

Skrivlig umsókn við upplýsingum um útbúgving, viðmælum og starvstíð skal vera skúlanum í hendi í seinasta lagi 13. juni 2003.

Meira fæst at vita um størvini við at venda sær til skúlan, tlf. 31 19 57.

TEKNISKI SKÚLIN Í TÓRSHAVN
Marknagilsvegur 75 · Postsmoga 239
FO-110 Tórshavn
Telefon +298 311957 · Telefaks +298 316621
e-mail: tst@tst.fo

Graving

Vit átaka okkum alt vanligt graviarbeiði við maskinu (3,5 t) t.d. snøgga rundan um hús, grava út fyri hjalli, bilhúsið o.s.v.

Sp/f ENL
tlf. 22 37 17

Bókhald

Søkt verður eftir bókhaldara
til eina bilasølu í Havn.

Arbeiðið umfatar alt vanligt bókhaldsarbeiði. Bert eitt fólk er í bókhaldinum, og tann ið settur verður í starvið, má tí hava kunnleika til bókhald og kunna arbeiða sjálvstøðugt.

Løn sambært avtalu.

Starvið skal setast so skjótt sum tilber.
Nærri upplýsingar kunnu fáast við at venda sær til Grannskoðarafelagið Rasmussen & Weihe (Joen Magnus Lamhauge).

Umsóknir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 16. juni 2003.

Sosialurin 341800

RASMUSSEN & WEIHE
STATSAUTORISERAÐ GRANNSKOÐARAFELAG P/F
An associated firm of
PRICEWATERHOUSECOOPERS
Á Gladsheyggi · Box 30 · FO-110 Tórshavn
Tel. (+298) 35 17 00 · Fax (+298) 35 17 01
E-mail: rasmussen@rasmussen.fo
http://www.rasmussen.fo

Samfelagsstevnan í Klaksvík

Um Gud vil verða hesi møti í Klaksvík á hvítusunnu:

Í Betesda
Hósdagin 5. juni
kl. 20.00: Bønarmøti

Fríggjadagin 6. juni
kl. 20.00: Uppbyggingarmøti

Í KÍ-høllini
Leygardagin 7. juni
kl. 20.00: Evangeliskt møti*
kl. 22.00: Opið hús

Sunnudagin 8. juni
kl. 10.00: Breyðbróting
kl. 12.30: Sunnudagsskúli
kl. 16.00: "Síggið markirnar"*
kl. 20.00: Evangeliskt møti*
kl. 22.00: Opið hús

Mánadagin 9. juni
kl. 10.00: Uppbyggingarmøti
kl. 16.00: Sangmøti*
kl. 19.00: Evangeliskt møti*

*Barnaansing verður á loftinum í KÍ høllini.

Øll eru hjartaliga vælkomin!

Samkoman í Betesda

Sosialurin 341800